Kommunufelagið

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
Yviri við Strond 15
Postrúm 347
110 Tórshavn

Dagfesting
18. juni 2024

Okkara j.nr.
24/03406-7

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
24/10183

**Ummæli av u.t.kng. um landsvegaskrá**

Kommunufelagið fekk 7. juni 2024 omanfyrinevnda uppskot til ummælis við freist týsdagin 18. juni 2024 kl. 12. Stundir hava ikki verið at leggja uppskotið fyri alla politisku leiðsluna í felagnum og málið er tí viðgjørt av formansskapinum.

**Útsetið málið til eftir summarfrítíðina**

Felagið átalar, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið ikki heldur seg til tær ummælisfreistir, sum eru galdandi fyri uppskot av slíkum slagi. Ráðið hevur upplýst, at hetta er grundað á, at tað er ynskiligt at fáa endaliga uppskotið fyri á seinasta landsstýrisfundi fyri summarfrítíðina.

Vit meta á ongan hátt hetta vera haldgóða grundgeving. Galdandi kunngerð hevur í nógv á verið í ósamsvari við faktisku viðurskiftini og ymsar avtalur, sum síðani eru gjørdar millum land og kommunur um vegastrekki. Eitt uppskot sum hetta kann hava heilt munandi ávirkan á allar kommunur í Føroyum og tað er ongin haldgóð orsøk til at skunda uppskotið ígjøgnum fyri summarfrítíðina

Tikið verður tí fult undir við, at viðurskiftini verða fingin í rættlag, men kommunurnar eiga at fáa neyðugu stundirnar at viðgera uppskotið. Tað vísa viðmerkingarnar frá kommununum til okkara eisini greitt.

Við hesum leisti fær ráðið sannlíkt ikki allar tættir við, og tað kann tí gerast neyðugt at gera arbeiðið av nýggjum innan stutta tíð. Hetta er stak óheppin tíðarspilla fyri allar partar, og felagið mælir tí ráðnum til at útseta málið til eftir summarfrítíðina.

**Viðmerkingar frá einstøkum kommunum**

Við omanfyrinevnda fyrivarni fyri at okkara viðmerkingar sannlíkt ikki eru fullfíggjaðar fyri øll øki í landinum, endurgeva vit í stuttum tær viðmerkingar, sum einstakar kommunur hava latið okkum.

Vit leggja í hesum sambandi áherðslu á, at tað er serstakliga óheppið og eigur ikki at koma fyri at vegastrekki verða tikin úr landsvegaskránni uttan greiðar avtalur um, hvør skal eiga og

umsita vegastrekkini frameftir. Slíkt eigur altíð at fara fram í tøttum samstarvi við kommununa í økinum, og avtalur av slíkum slagi eiga ikki at verða tiknar upp í landsvegaskránna fyrr enn allir partar eru samdir um tað.

Framferðarhátturin skapar eisini stórar óvissur, tí tað er púra onki løgfrøðiligt grundarlag fyri at landið av sínum eintingum kann leggja ogn og viðlíkahaldsábyrgd frá sær sjálvum og yvir á aðrar partar, herundir kommunur – kunngerð ella ei.

*Sumbiar kommuna* mótmælir harðliga ásetingini í § 2, stk. 1, nr. 1. Kommunan hevur ikki játtað at yvirtaka gamla sumbiarvegin vegin, sum harafturat er í sera ringum standi. Felagið tekur fult undir við mótmælinum, um tað er ætlanin at landsvegur við hesum gerst kommunalur uttan so at semja er við avvarðandi kommunu um hetta.

Mælt verður til at ásetingin verður tikin burtur, og at landið tekur upp samráðingar við Sumbiar kommunu, um tað er ynskiligt at fáa vegastrekkið úr landsvegaskránni og undir kommunala ogn og ábyrgd. Víst verður til skrivið frá kommununi, sum eisini hevur sent ráðnum.

*Hovs kommuna* mótmælir somuleiðis harðliga, um tað við § 2 í uppskotinum verður lagt upp til, at kommunan yvirtekur gamla hovsvegin um Hovsegg. Eisini hesin vegur er merktur av órøkt og vantandi endurnýggjan, og heldur ikki her er gjørd nøkur avtala við kommununa um at yvirtaka vegin.

Felagið tekur undir við sjónarmiðinum hjá kommununi um, at landið ikki kann loyva sær við einum pennastroki at leggja ábyrgdina av vegnum frá sær og yvir á Hovs kommunu. Hetta eigur á ongan hátt at koma fyri uttan samráðing og semju við kommununa.

*Eiðis kommuna* mótmælir á sama hátt, um uppskotið skal skiljast soleiðis, at kommunan við § 7, stk. 1, skal yvirtaka størri part av landsvegnum oman í Eiðis bygd. Ongin avtala er við kommuna um hetta.

Nýtt mark er eisini sett við Norðskála, sum sambært kommununi ikki gevur meining, tí tann nú nevnda Búðaráir kommununi kunnugt liggur streymoyarmegin millum brúnna og Streymnes.

Kommunan viðmerkir harumframt, at gingið verður út frá at sami leistur sum higartil verður nýttur til høvuðsvegin við Ljósá við norðaru innkoyring til bygdina, og norðara partin av gamla høvuðsvegnum, sum eitur Svínáavegur, sum er í Eiðis kommunu.

Felagið mótmælir staðiliga, at tað eisini í økinum hjá Eiðis kommunu verða tikin vegastrekki úr landsvegaskránni uttan at man hevur tikið upp samráðingar við kommununa um hetta. Mælt verður somuleiðis til ráðið tekur upp samband við kommunan um teir ivaspurningar, ið kommunan hevur víst á.

*Kvívíkar kommuna* viðmerkir til § 5, stk. 4, nr. 2, at ásetingin ikki er í samsvari við eina avtalu millum landið og kommununa. Kommunan hevur yvirtikið ein part av vegnum oman í Kvívíkar bygd, soleiðis at markið nú er við rulluportrið sunnanfyri ytstu húsini; uml. 180 metrar sunnanfyri Úlvsá.

Felagið mælir til, at ásetingin verður rættað samsvarandi avtaluni millum landið og kommununa. Víst verður til avtalu dagfest 11. september 2013 og skjalfest hjá Landsverki undir j.nr. 13/00794.

*Fuglafjarðar kommuna* vísir á, at § 7, stk. 4, nr. 2, er grundað á eina avtalu við Landsverk, sum ikki er hildin. Landsverk hevur ikki framt tað asfaltarbeiðið, sum er ein treyt fyri avtaluna um yvirtøku av vegnum.

Felagið mælir frá at seta ásetingina um hetta vegastrekkið í verk fyrr enn allar treytir í avtaluni millum landið og kommununa eru loknar. Víst verður til avtalu dagfest 2. januar 2024 og skjalfest hjá Landsverki undir j.nr. 13/00469.

*Viðareiðis kommuna* vísir á, at uppskotið als ikki nemur við gamla Viðareiðisvegin. Hesin vegur átti at verið landsvegur, hóast hann ikki verður nógv brúktur. Kommunan hevur roynt at fingið samskifti í lag við Landsverk um hetta.

Tað hevur ikki eydnast kommununi at koma á tal við Landsverk, og felagið mælir tí landsstýrismanninum til at taka um endan í hesum máli.

*Sunda kommuna* hevur fyri sín part víst á, at kommunan tekur undir við teimum pørtum av uppskotinum, ið viðvíkja kommununi. Kommunan mælir tó til, at greiða verður fingin á ognarviðurskiftunum v.m. á vegum, sum eru ella verða tiknir úr landsvegaskránni.

Felagið tekur undir við, at vegir ikki eiga at verða tiknir úr landsvegaskránni uttan at støða verður tikin til, hvør skal vera tinglýsti eigarin av vegnum og hvør skal umsita vegin frameftir. Víst verður til skrivið frá Sunda kommunu, sum eisini er sent ráðnum.

Kommunufelagið

At enda vísir *Tórshavnar kommuna* fyri sítt øki á eina avtalu við Landsverk frá 19. juni 2022. Felagið mælir til, at ráðið tekur upp sambandi við kommununa til tess at fáa eina loysn á teimum avbjóðingum, ið hava verið við at gjøgnumføra avtaluna millum partarnar. Víst verður til skrivið frá kommununi, sum eisini er sent ráðnum.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo_ · Heimasíða: www.kf.fo